## 700 funnin aftur á lívi

Myndugleikarnir í Taiwan stúrdu fyri, at 700 fólk vóru deyð í einum stórum skriðulopi, men nú eru øll funnin aftur á lívi. Sambært bjargingartænastuni vóru tey 700 rýmd úr bygdini Heian Lin, sum er har norðuri í landinum, áðrenn skriðan leyp. Tað bjargaði teimum. Tropiska ódnin Morakot hevði óvanliga nógv regn við sær, tá hon herjaði Taiwan, og tað nógva vatnið elvdi til vatnflóð og nógv skriðulop. Sambært tíðindastovunum hevur ódnin kravt 66 mannalív í Taiwan, og 61 fólk eru ikki komin afturíaftur. Morakot herjaði eisini Filipsoyggjarnar, Japan og Kina, har hon kravdi ávikavist 23, 13 og seks mannalív.



## 13 deyð í flogvanlukku

Eingin slapp livandi frá vanlukkuni, tá eitt leiguflogfar við 13 fólkum umborð datt niður í Papua Ný Guinea í gjár. Flogfarið var á veg til tað væl umtókta ferðamannastaðið Kokoda, tá tað brádliga hvarv av radaraskíggjanum hjá eftirlitinum. Nakrar tímar seinni funnu bjargingarlið vrakið í einum fjallalendi, og tað vísti seg, at øll tey 13, sum vóru við flogfarinum, høvdu latið lív. Tey flestu ferðafólkini vóru úr Avstralia, og avstralski forsætisráðharrin Kevin Rudd, hevur sent teimum avvarðandi samkenslufjarrit.

# Føroyar fara at doyggja sum

**- Eingin vinna í Føroyum, hvørki í gamlari ella nýggjari tíð, hevur áður upplivað so óstøðugar karmar sum fiskivinnan. Visti tú ikki betri, hevði tú hildið, at tað er ein tvangstanki hjá okkara politikarum, at lógin um vinnuligan fiskiskap og harvið karmarnir um vinnuna fyri alt í verðini skulu broytast – í minsta lagi einaferð um árið, siga Jákup Sólstein, Óli M. Lassen og Auðunn Konraðsson, sum hava vent sær til Sosialin við áhugaverdum hagtølum**




FISKIDAGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú nýtt fiskiár stundar til, og landsstýrið enn einaferð hevur skotið upp at skerja dagarnar umframt aðrar broytingar í fiskiveiðiskipanini, hava teir tríggir, Jákup Sólstein, Óli M. Lassen og Auðunn Konraðsson í Klaksvík, tosað saman um viðurskiftini.

Teir vísa á, at politiska tilmæli enn einaferð er skerjingar av fiskidøgum, hesaferð við 5 prosentum.

- Felagið Línuskip, Meginfelag Útróðrarmanna, Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag hava í hesum sambandi gjørt kanningar av húkanýtslu, tillutaðum og brúktum døgum, síðani fiskidagaskipanin kom í gildi. Tølini vísa heilt greitt, at nógv minni roynd er á føroysku grunnunum, og at royndin hesi seinni árini er flutt av innaru leiðunum út á ytri leiðir, eins og línuskipini eisini leita sær eftir nýggjum vinnumøguleikum, eitt nú í Grønlandi.

Teir siga, at hóast hesar greiðu niðurstøður, hoyrast enn røddir, sum mæla til størri skerjingar og fleiri broytingar í skipanini.

- Hendan framhaldandi gongdin er ein tann størsta hóttanin fyri framman hjá vinnuni. Eingin vinna í Føroyum, hvørki í gamlari ella nýggjari tíð, hevur áður upplivað so óstøðugar karmar sum fiskivinnan. Visti tú ikki betri, hevði tú hildið, at tað er ein tvangstanki hjá okkara politikarum, at lógin um vinnuligan fiskiskap og harvið karmarnir um vinnuna fyri alt í verðini skulu broytast – í minsta lagi einaferð um árið.

Teir vísa á, at broytingar í fiskidagatalinum verða tilmæltar, sjálvt um amboðið at broyta dagarnar ikki finnst.

- Tað einasta, ið sambært fiskidagaskipanini kann broyta ásetta dagatalið, eru broytingar í veiðiorkuni. Vinnan hevur í nógv ár ynskt eina nøktandi kanning av hesum broytingum, men talað hevur verið fyri deyvum oyrum, siga teir tríggir.

### Veiðuorkan flutt

Jákup Sólstein, Óli M. Lassen og Auðunn Konraðsson ásanna, at veiðiorka er flutt frá útróðrarflotanum til línuskipini, men hetta hevur samstundis havt við sær, at veiðiorka er flutt frá hýsu og toski til onnur fiskasløg.

Teir vísa til hjásettu talvu sum vísir, at talið av settum húkum um árið seinastu 12 árini hjá útróðrarflotanum er minkað við 59%. Samstundis sæst, at húkanøgdin hjá línuskipum heldur ikki er økt.

- Hvørjar eru tá grundgevingarnar fyri øktari skerjing? spyrja teir tríggir.

Í fiskiárinum 1997-98 hevði húkaflotin góðar 35.000 fiskidagar tillutaðar, men í dag hevur sami floti góðar 26.000 dagar. Talan er soleiðis um eina minking í samlaða dagatalinum uppá 9.598 fiskidagar ella sløk 27%.

- Við øðrum orðum eru fram til 14. juni 2009 einans brúktir stívliga 8.423 fiskidagar. Soleiðis eru út við 18.000 óbrúktir fiskidagar. Talvan vísir eisini greitt, at fiskdagatalið undir Føroyum hevur verið í fríum falli frá 2003 til í dag. Samstundis sæst eisini, at línuskipini ikki brúka fleiri dagar í dag enn í fiskiárinum 1997/98, vísa teir á.

- Alt tos um økt veiðitrýst má fána burtur, um fólk hava evni og vilja til at lesa hagtøl.

**Húkaflotin brúktir vanligir fiskidagar undir Føroyum**

| 1997-98 Dagar | 2007-08 Dagar | Húkanýtsla vanligir fiskidagar: Húkar | Stampar | Skipabólkar | 1997-98 Húkar | 2007-08 Húkar |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 6,036 | 4,322 | 300 | 12 | 5 A | 21,729,600 | 16,709,400 |
| 10,788 | 3,903 | 300 | 9 | 5 B | 29,127,600 | 10,538,100 |
| 734 | - | 300 | 6 | 5 D | 1,321,200 | - |
| 3,986 | 1,036 | 250 | 55 | 4 B | 37,276,250 | 14,239,638 |
| 2,624 | 582 | 250 | 45 | 4 A | 29,520,000 | 6,544,688 |
| 24,168 | 9,842 | Húkar | Stokkar | Útr. Bátar | 118,974,650 | 48,031,825 |
| 2,469 | 2,447 | 1,370 | 27 | Blk. 3 Línuskip | 91,328,310 | 90,503,433 |
| 26,637 | 12,289 | Línu- & útróðrarflotin - Húkar tils. | | | 210,302,960 | 138,535,258 |

Kelda: Fiskiveiðueftirlitið & útróðrar- og linumenr